Viðmerkingar til Rættarnevndina

Innleiðing
Lógaruppskotið er grundleggjandi broytt á týðandi økjum og hevur broytt samleika frá uppskotinun, sum var til hoyringar, dagfest 20. desember 2023.

Vísandi til hetta og vísandi til, at grundleggjandi broytingarnar, sum nú eru í uppskotinum, ongantíð eru viðgjørdar ella lagdar fyri serkøn ella aktørarnar á økinum, eigur lógaruppskotið at verða tikið aftur fyri síðan at verða lagt fram av nýggjum ella verða sent til nýggja hoyring eftir vanligum reglum.

Yvirskipað er endamálið við lógaruppskotinum sambært almennu viðmerkingunum at skipa elveitingarøkið sambært semjuni millum landsstýrið og kommunufelagið frá mars 2022.

Hetta er órógvandi, at eitt so týðandi øki verður avtalað millum kommunur og land, fyri síðan at verða borið tinginum at góðkenna sum lóg – uttan at nýggjastu og mest víttfevnandi broytingarnar hava verið fyrirekaðar og viðgjørdar á vanligan hátt.

Tá er grundleggjandi lógarfyrireikandi arbeiðið ikki gjørt á nøktandi hátt, har hugt verður at tørvandi ábótum á galdandi lógarreglur fyri at náa settum málum á skynsamasta hátt.

Heldur hava kommunurnar sum eigarar av SEV definerað loysnina saman við myndugleikanum, sum ynskir sær fleiri og munadyggari amboð at stýra elframleiðsluøkinum í smálutum, heldur enn at eggja til kapping, innovatión og privat átøk, sum galdandi lóg leggur upp til, og sum kunnu viðvirka til góðar loysnir.

Soleiðis síggja vit tað í dag, har privatu veitararnir hava bygt vindmylluparkir, sum framleiða elorku fyri umleið helvtina av tí prísi, sum SEV framleiðir fyri í Húsahaga og Neshaganum.

Hetta hevur higartil spart SEV, samfelagnum og náttúruni fyri nógvar tíggjutals milliónur í spardari oljunýtslu, eisini hóast øll elorkan úr vindi ikki enn kemur inn á netið.

Tilgongdin higartil
Røkt hevur latið inn viðmerkingar til uppskotið, sum var til almenna hoyring um ársskiftið. Tað er skjal 15 til hetta løgtingsmálið.

Víst verður til viðurskiftini, sum har eru ávíst, og sum enn eru viðkomandi.

Vit mugu tíverri ásanna, at onki av hesum sæst aftur í uppskotinum, sum nú er til viðgerðar.

Tvørturímóti er landsstýrið farið víðgongt til verka at telva privatu aktørarnar út og til fyrimuns fyri eina munandi meira myndugleikastýrda støðu.

Tað er ikki gagnligt fyri brúkaran og elprísirnar, og tað skundar ikki undir nakað grønt orkuskifti. Tvørturímóti vil hetta elva til, at privatu aktørarnir hava mundandi minni orsøk til at taka stig til

verkætlanir, nú allur initiativrættur verður tikin frá aktørunum og fluttur landsmyndugleikanum og SEV.

Viðmerkingar til partar av uppskotinum
Í mun til uppskotið, sum er til viðgerðar, hava vit m.a. hesar viðmerkingar:

Broyting nr. 6
Sum nakað nýtt í mun til uppskotið, sum var til almenna hoyring, hevur landsstýrið tikið undir við hoyringssvari frá SEV og kommununum um, at SEV skal kunna fáa rullandi 20 ára loyvi til sínar skipanarberandi eindir (sum t.d. sum størri termisk verk, størri vatnorkuverk og møguligar vatnpumpuskipanir), meðan onnur bara kunnu fáa síni loyvi longd eina ferð við 20 árum.

Hetta er munandi broyting í mun til galdandi lóg.

Hvør er orsøkin til henda munin og hví ikki halda áfram við galdandi § 4, stk. 2, um, at leingingin kann vera við 20 árum í senn?

Eingin kritikkur hevur verið av galdandi § 4, stk. 2, um leingingarmannagongdina.

Tað, sum Umhvørvismálaráðið førir fram í viðmerkingunum um, at tað ikki verður mett rætt at brúka sonevnd rullandi loyvi innan hetta økið, gevur ikki meining, tí galdandi lóg ásetir ikki skipan við rullandi loyvum, sum vit t.d. kenna hetta frá fiskivinnuni. Talan er um, at loyvi eftir umsókn kunnu leingjast við 20 árum í senn. Tað er skilagóð skipan, sum ikki setir myndugleikan ella menning av elframleiðsluøkinum til viks á nakran hátt.

Uppskotið leggur nú upp til, at SEV skal hava einkarrætt at eiga skipanarberandi eindir (sum størri termisk verk, størri vatnorkuverk og møguligar vatnpumpuskipanir). Hvør er orsøkin til tað, og hví skulu onnur forðast í líknandi?

SEV skal eisini kunna byggja hesi gigaverk uttan nakað krav um útboð. Hví tað? Vit vita frá øðrum útbyggingum uttan útboð, t.d. Sundsverkið, at talan gjørdist um enntá sera kostnaðarmikla verkætlan.

Eitt er, at SEV hevur ábyrgd av veitingartrygdini og í tí sambandinum ábyrgd av at finna hóskandi og tryggar skipanarberandi eindir, sum privat eins væl kunnu eiga at veita tænastur til SEV, sí uppskotið til § 15h, har SEV kann gera avtalur við onnur um skipanarberandi eindir/tænastur. Ongin orsøk er tó yvirhøvur til at áseta nakað um, at SEV *skal* vera eigari av hesum eindunum, herundir møguligar vatnpumpuskipanir.

Rættarnevndini kunnugt, sum almenningurin annars veit, so hevur felagið Vindrøkt, sum Røkt eigur í, í nógv ár arbeitt við einari pumpuverkætlan í Vestmanna, men ORKA sýtti í 2019 brádliga fyri at viðgera hesa umsóknina endaliga, tí ORKA vildi hava SEV at standa fyri hesum.

Tað málið er fyrr í ár kolldømt av Føroya kærustovni og víst retur til ORKU at viðgera, tí Vindrøkt hevur lógarkrav uppá at fáa sína umsókn viðgjørda.

Tann skipanin hjá Vindrøkt er annars ein heilt onnur og betri enn hon, sum SEV arbeiðir við, tí skipanin hjá Vindrøkt inniheldur eina stóra goymslu, sum kann forsýna alt landið í 47 dagar við nøktandi el frá vatnorku, um so ongin vindur ella avfall er.

Nú leggur so landsstýrið uppskot fyri tingið um, at SEV skal hava einkarrætt til slíkar pumpuskipanir, alt meðan umsitingin viðger heimvísta málið.

Aftrat hesum framgongur av broyting. nr. 7. at lógarheimildirnar hjá landsstýrinum at áseta samstarv um savningarøkið verður strikað. T.v.s. at landið frásigur sær ta heimild, sum hevur verið í lógini síðan 2007, fyri at aðrir aktørar skulu fáa tað truplari at koma inn á økini hjá SEV at samstarva.

Slíkt er helst at rokna sum lógarinntriv í umsitingarmál, sum eru til viðgerðar og hartil singulær lóggáva, sum í ørðum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, verður roknað sum grundlógarbrot. Hesum støðunum eigur Rættarnevndin tí at geva serliga ans, tí hetta trívir inn í verserandi mál og rakar bara einstakt felag.

Til nr. 7
Við hesi broyting, sum eisini er broytt grundleggjandi síðan almennu framløguna, verður lógarheimildin hjá landsstýrinum at áseta samstarv um savningarøki strikað, t.v.s. at landið frásigur sær ta heimild, sum hevur verið í lógini síðan 2007, fyri at aðrir aktørar skulu fáa tað truplari at koma inn á økini hjá SEV at samstarva.

Hetta er uttan, at greitt verður frá hesum í viðmerkingunum – enn minni grundgivið fyri, at hetta er neyðugt.

Hetta er eisini hóast einkarrætturin hjá SEV til vatnorkuna gekk út í 2013, og tá loyvini til SEV blivu endurnýggjað nakað eftir hetta, bleiv í teimum loyvunum tikin hædd fyri, at SEV skuldi tola, at onnur kundu fáa loyvi at framleiða elorku í ella á somu økjum, og at SEV tískil skuldi tola hetta sambært nýggju loyvistreytunum.

Onki framgongur av uppskotinum, hví hetta er neyðug leið at fara. Í serligu viðmerkingunum til broyting nr. 7 stendur tó nú sum nakað nýtt, at *"Kravið um alment útboð hevur eisini við sær, at orkumyndugleikin skal tryggja øllum áhugaðum javnbjóðis møguleika at bjóða, og tí ber ikki til at geva feløgum, sum hava fingið annað loyvi í sama øki, framíhjárættindi til fleiri útbyggingar á sama øki uttan alment útboð.*" Hetta er lóggáva í motivunum, sum ikki hoyrir heima í uppskotinum og eigur at verða strikað. Hartil fastlæsir hetta metingina hjá landsstýrinum í mun til at áseta samstarvið, og heldur ikki slíkt eigur at vera í serligu viðmerkingunum.

Løgtingið eigur sostatt ikki og hevur onga sakliga orsøk til at avmarka heimildina í § 4, stk. 5, so at henda ikki longur skal fevna um savningarøki eisini, soleiðis sum tað framgongur av galdandi lóg.

Broyting nr. 7 um § 4, stk. 5, um "Framleiðsluøki" og "Savningarøki" eigur tí at verða strikað. Annars tekur broytingin møguleikan at kappast um bestu pump storage loysnina í Heygadali burtur – alt meðan umsitingin viðger heimvísta kærumálið.

Til nr. 8

SEV hevur síðan 2013 ikki longur einkarrættt til at gagnnýta vatnorkuna. Tí eigur heldur ikki í § 5, stk. 1, at verða víst til rættin hjá SEV til at gagnnýta vatnorkuna, men til rættin hjá tí ella teimum, ið hava rætt til at gagnnýta vatnorkuna, tí onnur enn SEV kunnu eisini fáa slíkan rætt sambært avvarðandi lóggávu.

Við broytingini av § 5, stk. 3, nr. 5, so skal ikki lýsast alment, um SEV ynskir at fáa loyvi til nýggjar skipanarberandi eindir, t.v.s. til t.d. størri termisk verk, størri vatnorkuverk og møguligar vatnpumpuskipanir.

Eftir hesum skal at kalla alt nýtt, stórt sum smátt, virksemi í útboð, sum privat kunnu fáast við, meðan gigaútbyggingar í milliardaklassanum hjá SEV (men ikki somu hjá privatum aktørum) kunnu avgreiðast við einum pennastroki, uttan nakað alment útboð er kravt yvirhøvur.

Hetta tykist marghátttligt og hongur møguliga saman við, at við uppskotinum, broyting nr. 11, verður lagt upp til, at SEV aftur fær einkarrætt til elnetvirksemi og harvið samstundis einkarrætt til frítt at kunna gera størri termisk verk, størri vatnorkuverk og møguligar vatnpumpuskipanir, uttan at hetta nakrantíð skal í útboð ella er ein møguleiki fyri privatar aktørar at bjóða seg til.

Hetta vil vera stórt afturstig í mun til tær kappingarmekanismur, sum hóast alt eru í galdandi lóg, og sum hava virkað í verki, har privat kunnu bjóða seg til at byggja eisini vantorkuverk og pumpuskipanir. Harvið verður tann ávirkan á lægri prísir og skynsamar loysnir, sum kapping og møguleikin fyri kapping vanliga elva til, tikin úr lógini, men uttan at hetta er viðgjørt í uppskotinum sum ein høvðusbroyting.

Við broyting nr. 8 av § 5 verður Open-Door mannagongdin hartil strikað, t.v.s. at privat kunnu ikki longur taka nakað initativ, men mugu bíða eftir almennum útboðum.

Hetta er stórt afturstig, er ógrundað og hartil ikki sørt ørkymlandi, at landsstýrið aftur her vísir til eina avtalaða tíðarælan, sum er gjørd við SEV.

Um onki initiativ kann verða sett í verk, uttan at landsstýrisfólkið lýsir alment eftir umsóknum, so vil hetta frátaka møguleikanun fyri menning av alternativum verkætlanum. Ilt er at síggja, hvussu ferð skal koma á orkuskiftið, og sett mál skulu verða nádd, tá privati aktørurin verður settur at kalla til viks og missur alt initiativ.

Mælt verður staðiliga til, at Open-Door mannagondin verður varðveitt. Henda mannagongd ella møguleiki hevur higartil tryggjað, at tvær tær størstu vindmyllulundirnar standa í drift í Hoyvíkshaganum innan bara 5 ár, og hesar hava tryggjað SEV eina munagóða inntøku seinastu 2 árini.

Til nr. 11
Henda broytingin, sum gevur SEV monopol til elnetvirksemi, er nýggj og var heldur ikki partur av uppskotinum, sum var til almenna hoyring ársskiftið.

Sambært stuttorðaðu serligu viðmerkingunum verður einans staðfest, at hervið er tað bara SEV, sum hevur loyvi til elnetvirksemi.

Aftur her er ongin grundgeving fyri tí gagnliga ella neyðuga í broytigngini, onki er ávíst um nakra avbjóðing við verandi skipan og harvið er heldur eingin saklig orsøk til hesa broytingina.

Um einans SEV hevur loyvi til elnetvirksemi, so vil hetta taka fíggjarliga ágóðan undan loysnum at gagnnýta vindorkuna, herundir avlopsorku, til t.d. alternativ brennievni.

Nr. 22
Ongin skiftisregla er í uppskotinum.

Her eigur at verða ásett, at broytingarnar, sum tríva inn í rættin hjá privatum, ikki fáa gildi, tá lógin verður kunngjørd, men seinni, tí hetta vil tríva inn í mál, sum eru til viðgerðar v.m. og annars er óhóskandi/óneyðugt og vanliga ikki verður gjørt í nýggjum lógarinitiativum.

Endi
Hetta lógaruppskot kemur at forkoma vision 2030, tí við ætlaðu grundleggjandi broytingunum av elveitingarlóggávuni er alt privat initiativ og luttøka telvað burtur. Privata initiativið, sum hevur borið flestu størri útbyggingarnar á orkuøkinum higartil, og sum higartil hevur flutt okkum fram á grønu kósini, verður við fyriliggjandi uppskoti køvt.

Samanumtikið eigur uppskotið ikki at verða samtykt í verandi líki. Rættast hevði hartil verið at sent málið aftur til landsstýrið at fyrireika í breiðari høpi og við atliti til og virðing fyri verandi aktørum.

Vegna Røkt Sp/f

Jóhan í Niðristovu, stjóri